HEILSUMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF HEALTH AFFAIRS

# Skrivari til Kommunulæknaskipanina og Heilsumálaráðið

Eitt fulltíðarstarv fyri skrivari í barnsburðarfarloyvi til umsiting av Kommunulæknaskipanini er leyst at søkja til setan 1. juni 2011 ella skjótast til ber.

**Arbeiðið umfatar í høvuðsheitum**
- Avgreiða setanir til kommunulæknaavloysarar og setanir í kommunulæknaskipanini, herundir eisini samskifti við kommunur og aðrar samstarvsfelagar
- Lønaravgreiðsla, herundir eisini skráseting av útgjøldum
- Vanligt skrivstovuarbeiði/málsfyrireiking
- At skipa fyri fundum
- Vera skrivari hjá nevndum/arbeiðsbólkum

Tann, ið settur verður skal kunna tola broytingar í arbeiðinum og eisini kunna arbeiða uttan fyri Kommunulæknaskipanina - innan fyri økið hjá Heilsumálaráðnum.

**Vit hugsa okkum at tú hevur**
- Skrivstovuútbúgving
- Góðan kunnleika til KT og journalskipanir
- Kunnleika til almenna fyrisiting
- Góðan málsligan førleika í føroyskum, donskum og enskum
- Góð samstarvs- og samskipanarevni
- Evni at arbeiða sjálvstøðugt

**Vit bjóða**
Eitt fjølbroytt og spennandi starv, til tíðir strævið, men samstundis sera áhugavert og mennandi.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.
Setanarøkið fevnir um Heilsumálaráðið og stovnar undir tí.

**Nærri upplýsing**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Margit Stórá, fulltrúa, tel. 30 40 52, ella teldupost margit.stora@hmr.fo

**Umsókn**
Umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til: hmr@hmr.fo ella Heilsumálaráðið, Eirargarður 2, FO-100 Tórshavn

**Freist**
Freistin at søkja er 18. mai 2011, kl. 12.00

Sosialurin 341800

Eirargarður 2 · 100 Tórshavn · tel 30 40 50 · fax 35 40 45 · hmr@hmr.fo · www.hmr.fo

# Leygardagin kl. 17

Í sendingini er ein samrøða við danska rasarakoyraran Jason Watt, sum vitjaði í Føroyum í sambandi við at Handverkarabúðin hjá Bygma Balslev læt upp. Jason Watt fortelur um sítt lív sum rasarakoyrari og um lagnudagin í 1999, tá hann datt á motorsúkklu og breyt ryggin.
Eisini er ein samrøða við Marner við Skipá frá Føroya Oljusølu, sum umboðar Pennzoil í Føroyum.

*** Sendingin verður eisini endursend sunnukvøldið kl. 22**



Marner við Skipá



Jason Watt

2
Vinnu- & bilradio á Rás

ÚTBJÓÐING

## Gólvumvæling í C-bygninginum á Landssjúkrahúsinum

Við hesum verður arbeiðið at umvæla gólvini í C-bygninginum á Landssjúkrahúsinum boðið út í almenna lisitatión. Talan er um gráa bygningin, sum stendur við J.C. Svabos gøtu 49.

Arbeiðið fevnir um at taka linoleum av gólvinum á báðum hæddum, leggja 12 mm krossfinér og nýtt linoleum á aftur og at stytta hurðarnar. Gólvvíddin er um 2 x 500 m2.

Lisitatión verður á Landsverki, Tinghúsvegi 5, 100 Tórshavn fríggjadagin 27. mai 2011 klokkan 15.

Útbjóðingartilfarið verður bert útflýggjað talgilt. Bjóðandi kunnu fáa tað við skrivliga at venda sær til jaar@lv.fo ella til Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn.

Ástaðarfundur verður mánadagin 16. mai 2011 kl. 13. Møtt verður við leiðbeiningina.

Tá biðið verður um útbjóðingartilfar, skal upplýsast navn á virki, adressa, teldupostadressa, vinnutal, kontaktpersónur og tlf.nr. hjá kontaktpersóni.

Spurningar í sambandi við prosjektið kunnu sendast skrivliga til jaar@lv.fo fram til fríggjadagin 20. mai 2011. Innkomnir spurningar verða svaraðir fram til týsdagin 24. mai 2011.

SENDISTOVAN

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo | LANDSVERK byggir land

*Landsverk er ein stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*

NOMATEK
*– heildarveitari av rustfríum stáli*

VIÐ SANDÁ 1
FO-100 TÓRSHAVN
TEL. 356900
FAKS 356901
NOMATEK@NOMATEK.FO
WWW.NOMATEK.FO

# Maskinsmiðir til Nomatek

## Vegna nógv økta framleiðslu søkja vit eftir maskinsmiðum

Til framleiðslu okkara søkja vit eftir maskinsmiðum at byrja skjótast gjørligt.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um framleiðslu av útgerð úr rustfríum stáli.

Hetta verður gjørt við framkomnum maskinum og vælútbúnum fólki.

Nomatek arbeiðir innan projektering og framleiðslu av útgerð til vinnuna.

Hevur tú hug til hetta arbeiði á einum áhugaverdum arbeiðsplássi í støðugari menning, so send eina skrivliga umsókn við viðkomandi prógvum til okkum.

www.grafikmaster.fo

Nomatek byrjaði virksemi sítt í 1979 sum teir fyrstu í Føroyum, sum burturav projekteraðu og framleiddu útgerð úr rustfríum stáli. Á Nomatek nýta vit nógva orku til menning av nýggjari útgerð fyri at halda okkum í fremstu røð, tá tað snýr seg um at framleiða útgerð til virkir og at kunna loysa aðrar uppgávur á besta hátt. Á teknistovuni nýta vit mest 3D tekningar, har vit projektera í Inventor, sum er eitt av mest framkomnu telduforritunum til maskinkonstruktión. Innan framleiðsluna seta vit stór krøv. Útbúnir handverkarar og røttu maskinurnar eru alneyðug.